# Krevja svar í seinasta lagi um tveir mánaðir

*Føroya Fiskavirking hevur nú fingið bræv frá Vágs Býráð við boðum um, at antin verður flakavirkið latið upp aftur, ella verður Fiskavirking sagt upp í Vági*



*Flakavirkið í Vági hevur staðið stongt í fleiri ár. Nú hava vágbingar fingið nokk og teir vilja hava greitt svar frá Fiskavirking um, hvat ætlanin er. Og hendir onki nú, verður Fiskavirking avsagt í Vági so onnur kunnu sleppa framat*

Áki Bertholdsen

Nú hava vágbingar mist tolið við Føroya Fiskavirking og nú vilja teir hava greiði á, hvussu verður vorðið við flakavirkinum í Vági.

Flakavirkið hjá Føroya Fiskavirking í Vági hevur staðið stongt í fleiri ár, men tað vilja vágbingar ikki lata sær lynda longur

Og nú hava teir givið Fiskavirking greið boð:

Antin verður flakavirkið latið upp aftur heilt skjótt, ella verður Fiskavirking sagt upp í Vági.

Tað er nakað síðani Vágs Býráð samtykti at fáa greiði á flakavirkinum í Vági.

Og í farnu viku fekk Fiskavirking bræv frá sakføraranum hjá Vágs Býráði.

Í brævinum verður leiðslan í Fiskavirking biðin um at greiða frá, hvørjar ætlanir hon hevur við flakavirkinum í Vági.

Samstundis verður boðað frá, at eru ongar ítøkiligar ætlaninir, fer Vág Býráð at siga sáttmálan upp um grundstykkið, sum Flakavirkið stendur á.

Tað er nevniliga soleiðis, at hóast tað er Føroya Fiskavirking, sum eigur sjálvan virkisbygningin, er tað kommunan, sum eigur grundstykkið, sum virkið stendur á.

Men í leigusáttmálanum stendur, at verður virkið ikki brúkt til tað, sum tað varð ætlað til, tvs, til fiskaarbeiði, hevur kommunan rætt til at siga sáttmálan upp. Og tað er hendan ásetingin í sáttmálanum, sum Vágs Býráð nú ætlar at brúka.

**Brúk fyri stykkinum**

Verður sáttmálin sagdur upp, noyðist Fiskavirking antin at selja virkið, ella at taka tað niður.

Fiskavirking hevur fingið tveir mánaðir til at svara brævinum frá Vágs Býráð.

Jógvan Krosslá, býráðsformaður, ger púra greitt, at býráðið krevur eitt greitt svar frá Fiskavirking um, hvat ætlanin er við virkinum.

Hann skoytir uppí, at harumframt krevur Býráði, at virkið í Vági skal latast upp heilt skjótt, ella verður sáttmálin sagdur upp.

– Eitt flótandi svar sum t.d. at Fikavirking arbeiðir við at lata virkið upp einaferð í framtíðini, tá ið umstøðurnar loyva tí, ella okkurt líknandi, verður ikki góðtikið, tí tað er svarið, vit hava fingið øll árini, sigur hann.

–Vit mugu fáa eina loysn á málinum um flakavirkið í Vági heilt skjótt. Tað er eitt so mikið stórt grundstykkið, at tað kann ikki ligga deytt longur. So antin letur Fiskavirking virkið upp aftur, ella verður sáttmálin sagdur upp, so at stykkið kann brúkast til onnur endamál.

Hann sigur, at áhugi er fyri at fáa stykki á havnalagnum at byggja Fiskavirki á, so tað ber ikki til at eitt so stórt grundstykki skal liggja bundið til onga nyttu.

Hann sipar m.a. til, at býráðið hevur fingið eina ítøkiliga umsókn frá einum felag um at fáa eitt stykki til at byggja eitt laksavirki á.

– Hetta er eitt arbeiðspláss til yvir 100 fólk, so tað er ein vanlukka ikki at hava eitt stykkið at vísa á, sigur Jógvan Krosslá.

## Ársins dagur mátti strikast

Áki Bertholdsen

Tað vánaliga ferðasambandið, sum verður ímillum Suðuroynna og Havnina, ímeðan Smyril er á beding, hevur longu fingið avleiðingar.

Eftir ætlan skuldi stór musikkstevna verða á Tvøroyri Dýra biðidag.

Hetta er tann afturvendandi stevnan fyri hornorkestur, sum er Dýra biðidag á hvørjum ári.

Eftir ætlan skuldu einir 220-230 blásarar úr øllum landinum hittast í Suðuroy, umframt onnur huga so tilsamans skuldu yvir 300 fólk hittast á stevnuni.

Men hendan stevnan mátti avlýsast.

–Nú Smyril er farin á beding, og Claymore siglur fyri hann, varð ongin trygd fyri, at tað bar til hjá teinum at sleppa aftur og fram, og tí máttum vit avlýsa stevnuna, sigur Anna Kirsten Thomsen, sum er ein av fyrireikaruum.

Hetta heldur hon er ógvuliga harmiligt, tí hetta er dagurin, sum allir hornblásarar í landinum gleða seg til.

– Hetta er ársins størsti dagur hjá teimum, sum spæla í hornorkestri og hetta er dagurin, sum øll venjing, alt árið miðjar fram ímóti, tí hetta er dagurin ,tá ið teir sleppa at vísa hvørjum øðrum, hvat teir duga.

Av tí, at hetta er eitt so stórt tiltak, eru fyrireikingarnar longu farnar ígongd. Men tað er alt farið í vaskið. Ítróttarhøllin var bíløgd til tað stóru konsertina, veitslumatur til 300 fólk var umbiðin, skráir og sangir vórðu prentaðir og dansiorkestur varð biðið.

–Men so fer alt í fisk tí at ferðsambandið verður skert og tað er ov vánaligt.

Tað eru níggju ár síðani at hornorkestrið á Tvøroyri seinast var vertur fyri hornorkestur stevnuni, so hetta var eitt tiltak, tey høvdu glett seg ómetaliga nógv til.

Nú tað var neyðugt at avlýsa stevnuna, verður ístaðin eitt skert tiltak á Oyrabakka, men tað verður ikki tað sama.

– So royna vit aftur næsta ár- um politikarar og Strandferðsla annars vilja.

– So ístaðin fyri at sleppa frá at fara av oynni fyri einaferð skuld, noyðast vit nú norður á Oyrabakka.

– Men sum tey einastu í landinum, sleppa vit ikki heimaftur um kvøldið, men mugu liggja nátt norðan fyri, sigur Anna Kristin Thomsen.

# Má sigla tríggjar ferðir um dagin

Áki Bertholdsen

– Tað er ikki ein Suðuroyingur, sum er nøgdur við tað loysn, sum er fingin á suðuroyarsiglingini ímeðan Smyril er í dokk.

Tað heldur Jógvan Krosslá, býráðsformaður í Vági.

Og hann leggur afturat: teir hava fullan rætt til at vera ónøgdir.

Hann sigur, at av tí at Claymore bara tekur helvtina av teimum bilum, sum Smyril tekur, er tað heilt eyðsæð, at hann kemur ikki at nøkta tørvin, tí Smyril er fullur, hvønn einasta túr.

Tørvurin á flutningi økist í hvørjum, bæði til farm og til fólk, og eftir gongdini, sum hevur verið, kemur ikki uppá tal, at hann nøktar tørvin.

Hann sigur, at hann trúði ongantíð, at tað fór at blíva so galið, sum tað er blivið.

–Eg havi altíð trúð, at ein hampilig loysn varð funnin, men nú mugu vit so ásanna, at so varð ikki.

Jógvan Krosslá sigur, at tað minsta, sum kundi verðið gjørt, tað var, at Claymore sigldi alt samdøgurið.



*Claymore fer ikki at nøkta tøvrin og tí verður tað neyðugt at sigla ein túr eyka um náttina, heldur býráðsformaðurin í Vági*

– So hevði hann siglt tríggjar ferðir um samdøgurið, og so hevði tað verið tætt upp ímóti, at hann nøktaði tørvin.

Hann heldur, at sigldi hann tríggjar ferðir, kundi náttartúrurin í mesta mun verið farmatúrur, men hetta hevði so gjørt tað nógv liviligari umborð um dagin og givið nógv betri pláss til persónbilar um dagin.

Hann veit, at hetta hevði kravt tvær manningar.

– Men hetta er nakað, sum má gerast.

Og hann heldur, at var viljin til staðar, bar tað eisini til, tí Claymore var bíligur at leiga. Annars heldur hann, at skipið er helst róligt at sigla við, tí tað er breitt og hevur stabilisatorar.



# Síðsta útkall til ONS 2000







*Løgmaður, oljuráðharrin og menningarstjórin á ONS 98*

Jan Müller

Í dag gongur freistin út at lata Oljumálastýrinum umsókn til at vera við í oljuleiting við Føroyar. Men í dag er eisini um at vera seinasta útkall fyri føroyskar fyritøkur, sum vilja vera við á stóru altjóða oljumessuni ONS 2000 í Stavanger í august.Kjartan Kristiansen, menningarstjóri sigur við Sosialin, at freistin fyri at koma við í stóra luttøkukatalogi í sambandi við ONS er farin, men teir vilja kortini vera lagaligir og geva fyritøkum, sum enn ikki hava tikið endaliga avgerð, at siga frá nú.

Umleið 20 fyritøkur hava higartil teknað seg til ONS, nakað minni enn til oljumessuna í Aberdeen í fjør. Sjálvur heldur menningarstjórin, at tað er rættiliga umráðandi fyri fyritøkur, sum vilja vera við í komandi oljuvinnu, at tær eru við á ONS, tí tað er har, at tær kunnu finna samstarvspartnarar, nú skjøtil verður settur á oljuleiting á landgrunninum.

Nettupp hetta at finna sær fyritøkur aðrastaðni at samstarva við er av stórum týdningi, tá hugsað verður um, at hetta fyri føroyingar er ein nýggj vinna, og at vit eru lutvíst smáir, tá talan verður um at fara upp í hesa vinnu sum veitarar av vørum og tænastum. Ein týðandi boðskapur frá føroyskum myndugleikum til oljufeløgini í sambandi við útbjóðingina er, at virksemi í oljuvinnuni skal yvir føroyskan keikant. Hetta gevur føroyskum fyritøkum stórar møguleikar, men tað krevur samtíðis eisini sera nógv av fyritøkum, og fyri at kunna nøkta krøvini, sum oljufeløgini fara at seta til veitararnar, so hevur tað alstóran týdning, at føroyskt vinnulív fær samband við útlendskar fyritøkur, ið longu arbeiða í oljuvinnuni. Og her er ONS eitt gott høvi. Ein góður og stórur føroyskur básur á ONS vil eisini vera ein týðulig útmelding til altjóða oljuídnaðin, at vit føroyingar vilja eisini vera við í menningini av hesi vinnuni um okkara egnu leiðir. Roknað verður annars við, at nógvir føroyingar fara á ONS og í hesum sambandi er umráðandi at bíleggja ferðaseðil og fáa innivist longu nú. Meira um ONS við at fara inn á Oilwell-linkin á Internetsosialinum.

*Hóast fútaforboð móti ráðgevum:*

# Føroya Kolvetni letur umsókn inn

Jan Müller

Býarrætturin í Oslo gjørdi í mánadagin av at ganga kravinum frá Norsk Hydro móti trimum fyrrverandi Sagafólkum, sum hava ráðgivið Føroya Kolvetni í sambandi við 1. útbjóðing, á møti. Fútaforboðið móti teimum trimum Sagex-oljuserfrøðingunum at arbeiða við tí føroyska økinum stendur við til eftir loyvini til at vera við í 1. útbjóðing eru latin í heyst.– Eg eri ómetaliga vónbrotin av hesi avgerðini, sum eg heldur ikki skilji sigur ein ovfarin Terje Hagevang. Hann og starvsfelagar hansara hava longu kært avgerðina til hægri rætt. Terje Hagevang vísir á, at hetta er eitt sera prinsipielt mál og fáa teir heldur ikki viðhald í landsrættinum, so er ikki óhugsandi, at málið endar í Hægstarætti. Hann er fullvísur í, at fútabannið móti teimum er eindømi í norskari oljusøgu. Hann kennir ikki til nakra slíka hending fyrr. Sjálvur hevur hann arbeitt í oljuvinnuni í meira enn 20 ár.

Sosialurin skilur, at grundgevingin fyri dóminum er tann, at tað ber ikki til at skilja millum generella og serstaka vitan. Av tí at tey trý Sagexfólkini leingi hava arbeitt hjá Saga, og sum Norsk Hydro nú hevur yvirtikið, sita inni við týðandi vitan frá hesi tíðini um føroysku undirgrundina, so hevur Norsk Hydro mett, at tey ikki hava loyvi til at geva øðrum oljufeløgum hesa vitan í sambandi við føroysku útbjóðingina. Og tað hevur rætturin í Oslo givið tí viðhald í.

Fútaforboðið merkir tó ikki, at Føroya Kolvetni ikki verður við í 1. rundu. Tey trý Sagexfólkini hava eina samstarvsavtalu við Føroya Kolvetni um at taka sær av tí tøkniliga partinum í sambandi við at senda umsókn til myndugleikarnar.

Umsóknin er longu liðug og verður hon latin myndugleikunum, áðrenn freistin gongur út mikudagin. Uppá fyrispurning um fútaforboðið fær nakra ávirkan á umsóknina hjá Føroya Kolvetni sigur Terje Hagevang, at tað dugir hann ikki at síggja, at hon skal. Men hann viðgongur, at stevningin hjá Norsk Hydro longu hevur skatt møguleikarnar hjá Føroya Kolvetni. Hon hevur m.a. skatt royndirnar at fáa samstarv við aðrar bólkar. Hvat umsóknini hjá Føroya Kolvetni viðvíkur sigur Terje Hagng, at hon er eitt valaarbeiði.

Men hvussu kann eitt so lítið felag sum Føroya Kolvetni einsamalt lata inn eina umsókn spurdu vit norska oljuserfrøðingin? -Hvat viðvíkur tí peningaligu partinum av at vera við í útbjóðingini, so síggi eg nakran trupulleika í tí. Tað skal nokk koma uppá pláss. Men trupulleikin verður kanska heldur tann tekniski parturin, nú fútaforboð er sett móti samstarvspartnaranum Sagex.

Terje Hagevang heldur annars ikki, at tað nýtast at vera nakar vansi hjá Føroya Kolvetni, at tað ikki er saman í einum bólki nú undan innlatingarfreistini.

- Tað er ikki nevniliga ikki óvanligt, at myndugleikar áleggja oljufeløgum at arbeiða saman í sambandi við eina nýggja útbjóðing. Hetta er vanlig mannagongd serliga í Noregi men eisini í Bretlandi og Írlandi, so Terje Hagevang sær ikki spurningin um at vera við í einum bólki nú ella ikki at vera avgerandi fyri, um føroyska oljufelagið í heila takið kann luttaka í útbjóðingini. -Í løtuni stendur Føroya Kolvetni á egnum beinum. Vit, sum hava ráðgivið tí og tulkað seismikk, sum varð keyptur herfyri, mugu so bíða viuð at taka støðu til, hvat víðari skal henda, til eftir at loyvini verða latin í heyst.



*Terje Hagevang í miðjuni saman við einum av Sagexstarvsfeløgunum og stjóranum í Føroya Kolvetni, Niels Sørensen. Her eru teir í ferð við at leggja seinastu hond á umsóknina, bert stutt áðrenn dómur fall móti ráðgevunum hjá føroyska oljufelagnum.*



*Tað var oljusamtakið við Norsk Hydro /Saga Petroleum Føroyar), Agip og Anadarko, sum var fyrst at lata Oljumálastýrinum umsókn um loyvi at bora á landgrunninum. Umframt at lata eina felags umsókn lótu Agip og Anadarko eisini hvør sína umsókn. Vm. Ron Lansdell frá Agip við umsókn frá Agip og Marathon, í miðjuni Arvid Halvorsen frá Norsk Hydro við umsóknini frá teimum tirmum feløgunum í samtakinum og hm. Richard Hook frá Anadarko, ið eisini einsamalt letur umsókn inn. Í gjár var Texaco-bólkurin í Oljumálastýrinum.Í dag vitja Amerada-bólkur, BP Amoco, Statoilbólkur og Føroya Kolvetni. Mynd Jens K. Vang*